# Forsetin býr á Bessastøðum

Við útkantin av Hafnarfjørðinum á Álftanesi liggur stóri garðurin Bessastaðir, sum er bústaðurin hjá tí til eina og hvørja tíð sitandi forsetanum. Tann, sum átti garðin seinast, lat hann til íslendsku tjóðina, tá brúk varð fyri einum tignarligum og søguligum bústaði fyri landsins forseta. Bygningarnir eru frá 1700-talinum og vóru fyrr bústaður hjá danska landfútanum. Í kjallaranum eru útgravingar, ið vísa, at fólk hava búð her síðani 1200- talið. Her hevur verið lærdur skúli, og Bessastaðir hava altíð havt ein týðandi leiklut fyri íslendsku søguna. Kirkjan á staðnum er opin fyri almenninginum og liggur sera vakurt við útsýni móti høvuðsstaðnum, Reykjavík.






















